## Svangir tjóvar

Í nátt var innbrot i eina matstovu í miðbýnum í Havn. Vanliga tá ið brotið verður inn, verður leitað eftir brennivíni, sigarettum ella pengum, men tað var tað ikki talan um í hesum føri. Hesir tjóvarnir vóru hvørki tystir ella í tubbaksneyð, tí løgreglan sigur, at, tað, tjóvarnir høvdu stolið, vóru nakrir posar av rækjum og skeljafiski. Løgreglan er nú í ferð við at kann málið.



## Fleiri skuldsettir fyri harðskap

Løgreglan hevur ikki gingið arbeiðsleys nú á hvítusunnu, men talan hevur kortini ikki verið um tað stóra. Men sjáldan fer eitt vikuskifti framvið uttan at fólk koma til ilnar og so var aftur hesuferð. Í hesum sambandi eru nakrir mans tiknir fyri harðskap. Í tí eina førinum var ein maður sparkaður í høvdið, men so vítt kunnugt, hendi ikki álvarsligur skaði. Men løgreglan kannar málið og so fær tað teir avleiðingar, tað eigur at fáa.

# Trygdin umborð er í lagi

**- Tað er eingin orsøk til at gera fólk óttafull. Øll, sum hava hug til sjólívið, kunnu trygt fara til skips, sigur Føroya Skipara- og Navigatørfelag í viðmerking til úttalilsir hjá formanninum í Føroya Fiskimanna- felag, Jan Højgaard**

SJÓLÍV
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Føroya Skipara-og Navigatørfelag er als ikki samt við sjónarmiðini hjá formanninum í Føroya Fiskimannafelag, Jan Højgaard, sum hevur sagt, at tað er lívshættisligt at fara til skips.

- Jan Højgaard hevur í fleiri førum sagt, at trydin umborð á føroyskum fiskiskipum er út av lagi vánalig. Dag og daglig verða fiskimenn knústir sundur.

Soleiðis segði formaðurin í Fiskimannafelagnum í sjónvarpsorðaskifti seinasta hóskvøld. Hin parturin í kjaksendingini var formaðurin í Reiðarafelagnum, Viberg Sørensen.

Føroya Skipara-og Navigatørfelag heldur ikki, at slíkar negativar útsagnir gagna trygdini, ei heldur umdøminum, hjá okkara høvuðusvinnu.

Hetta ger felagið greitt á síni heimasíðu.



*- Allir fiskimenn hava nú trygdarskeið, og hetta hevur bøtt munandi um tilvitanina um trygdina umborð, sigur Føroya Skipara-og Navigatørfelag*
*Mynd: Rógvi K. Mouritsen*

### Nógv er broytt

- Allir fiskimenn hava nú trygdarskeið, og hetta hevur bøtt munandi um tilvitanina um trygdina umborð. Vit eru ikki komnir á mál enn, men tað gongur rætta vegin, sigur felagið hjá navigatørunum.

Lagt verður aftrat, at heilsustøðan hjá fiskimonnum er vorðin nógv betur, síðani heilsuváttan skal takast við tvey ára millumbili.

- Arbeiðsumstøðurnar eru eisini ein partur av heilsukanningini, sigur felagið.

Føroya Skipara-og Navigatørfelag sigur, at felagið er við í eini tilgongd, har nógv verður gjørt fyri bøta um trygdina og heilsuna hjá fiskimonnum.

- Yrkisfeløgini mugu luttaka konstruktivt í hesum arbeiði, leggur felagið aftrat.

### Tryggur til skips

Felagið hjá navigatørunum heldur onga orsøk vera at gera fólk óttafull.

- Øll, sum hava hug til sjólívið, kunnu trygt fara til skips. Skiparin hevur saman við reiðaranum revsirættarliga ábyrgd fyri, at allar trygdarreglur verða hildnar.

Føroya Skipara-og Navigatørfelag sigur seg soleiðis hava álit á, at limir felagsins taka hesa ábyrgd í fullum álvara.

# Hans Óli er havnameistari

**Hans Óli Viberg er settur sum nýggjur havnameistari við Tofta havn eftir Paula R. Petersen, sála**

HAVNAMEISTARI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tofta havn hevur nú fingið nýggjan havnameistara, eftir at havnameistarin gjøgnum mong ár, Pauli R. Petersen, doyði í góðum árum.

Hans Óli Viberg, sum nýggi maðurin eitur, hevur heimaskiparaprógv og hevur verið sjómaður tað mesta av sínum lívi.

### Byrjaði ungur

Á heimasíðuni hjá Nes kommunu verður sagt, at



*Hans Óli Viberg er nýggjur havnameistari við Tofta havn. Myndin er tikin á bátafestivalinum á Toftum herfyri*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

nýggi havnameistarin fór sín fyrsta túr til skip sum 14 ára gamal í 1976 við Sigmundi Brestirsyni.

Í 1995 fór hann á skiparaskúla og eftir at hava lokið prógv sum heimaskipari, hevur Hans Óli silgt við føroyskum, grønlendskum, donskum og norskum skipum.

Seinastu trý árini hevur hann silgt við Havsand í Noregi.

Hans Óli er giftur Hjørdis Viberg, og tey eiga tveir synir.

# Hávur leyp á ferðamann

**Tað er ikki so sjáldan, at hávur leypur á ferðafólk, sum svimja út fyri strendrunum, og slíkt álop er ikki bara sum at siga tað**

RÆÐSLA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Løgreglan í Avstraliu sigur, at ein 37 ára gamal ferðamaður var staddur einar 80 metrar úr landi, tá ein hávur leyp á hann millum fleiri ferðandi, sum svumu um hesar leiðir við Middleton Bech, tætt við Albany í vestara parti Avstraliu.

Eitt eygnavitni - ein kvinna - sum hjálpti manninum undan at gerast hávaføði, sigur seg vera ovfarna av, at hávurin váðaði sær so nær landi.

- Eg sá, at ein neyðstaddur maður baksaði í sjónum og rópti um hjálp, sigur eygnavitni, sum hjálpti manninum til lands aftur.

Tað er West Australian, sum ber hesi tíðindi.

Kvinnan sigur, at stór pettir vóru bitin av beininum á tí 37 ára gamla, men at hann kortini var róligur og sá ikki út til at missa so ógvuliga nógv blóð.

Álopni maðurin er lagdur inn á sjúkrahús, og sambært løgregluni á staðnum er støðan hjá honum "stabil", sum tað verður rópt.

*Ikki er tespiligt at enda í kjaftinum á einum slíkum*

